UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum útoyggjalærari í Kirkju-Hattarvíkar skúla

**Hevur tú hug at royna teg sum útoyggjalærara, so er møguleiki at søkja tíðaravmarkað starv í Kirkju/Hattarvíkar skúla skúlaárið 2021 - 22. Starvið verður sett frá 1. august 2021.**

## Um starvið

Í Kirkju/Hattavíkar skúla verða 2 næmingar næsta skúlaár, ein næmingur í 7. flokki og ein í 9. flokki.

Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans. Hann undirvísir í øllum lærugreinum og hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans.

Útoyggjalærarin skal fremja gott samstarv millum skúla og heim og virka fyri, at næmingarnir trívast og fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

## Førleikakrøv

Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalærara-útbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur at hava leiðsluroyndir.

## Lønar- og setanartreytir

Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

## Umsóknir

Umsókn saman við avriti av prógvi, c.v. og øðrum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **15. mai 2021**.

**Umsóknin verður stílað til:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti**:** **ummr@ummr.fo**

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita uttanríkismál, undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*